# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hvat nyttar tað at tosa um at verja børnini, tá tey kunnu síggja porno og harðskap í sjónvarpinum við hús?*

*Benadikt pávi*

# Oliver burturfluttur uttan fyri barnagarðin

**Fimm ára gamli Oliver bleiv burturfluttur uttan fyri barnagarðin, tá mamman kom eftir honum**

Í gjár gavst løgreglan í Norðursælandi at leita eftir tí 18 ára gamla Jakob Haugen Kosmann, sum hvarv herfyri. Nú leitar norðursælendska løgreglan eftir tí fimm ára gamla Oliver, sum bleiv burturfluttur uttan fyri ein barnagarð í Virum seinnapartin í gjár.

Klokkan var um hálvgum fimm, tá mamma Oliver kom út úr barnagarðinum við dronginum, men áðrenn hon vardi, lupu teir menn á tey. Annar helt mammuni, meðan hin tók Oliver og koyrdi hann í ein bil, sum ein triði maður sat í og bíðaði. Fólk fingu fatur á nummarplátunum, men tað vísti seg, at tær vóru stolnar av einum øðrum bili í Albertslund gjáranáttina.

Løgreglan sendi alt fyri eitt stór lið at leita, og eftirlit var við allar brýr og ferjur, men bilurin við burturflytarunum og Oliver er ikki funnin.



*Oliver bleiv burturfluttur uttan fyri sín barnagarð*
*Mynd: Polfoto*

**Væl skipað**

Løgreglan í Norðursælandi sigur, at tað er eingin ivi um, at burturflytararnir høvdu fyrireikað seg væl.

- Burturflytararnir høvdu gekkaskort fyri andlitið og hettu á høvdinum. Tað er eingin ivi um, at hetta var var lagt til rættis, men enn kunnu vit ikki siga, um hetta eisini var professionelt, sigur Henning Svendsen hjá norðursælendsku løgregluni. Hann leggur tó afturat, at burturflytingar eru sjáldan væl fyrireikaðar ella lagdar til rættis, so heilt óprofessionellir eru burturflytararnir ikki, sigur hann.

Oliver er av kinesiskum uppruna. Foreldrini eiga fleiri matstovur, men løgreglan veit ikki, um tað hevurnakað við burturflytingina at gera. Hinvegin hevur løgreglan staðfest, at burturflytingin hevur ikki samband við nakað innanhýsis stríð í familjuni.

# Halda seg hava funnið drápsmannin

**Ein 17 ára gamal drongur er nú skuldsettur fyri at hava skotið Rhys Jones**

Løgreglan í Liverpool heldur seg nú hava funnið tann, sum myrdi tann 11 ára gamla Rhys Jones í august í fjør.

Í hvussu er hevur løgreglan formliga skuldsett ein 17 ára gamlan drong fyri at hava skotið Rhys Jones, tá hann var á veg til hús tann 22. august. Samstundis hevur løgreglan skuldsett fimm aðrar ungdómar fyri minni lógarbrot í sambandi við drápið.

Rhys Jones bleiv skotin, tá hann var á veg til hús eftir at hava verið til fótbóltsvenjing. Drápið vakti stóran ans og elvdi til nógv orðaskifti um ungdómskriminalitetin í Bretlandi.



*Rhys Jones hevði verið og vant fótbólt, tá hann bleiv skotin*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Blair vil hava íløgur

Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin Tony Blair virkar í dag sum sendimaður í Miðeystri vegna ta sokallaðu Miðeystur-kvartettina, og nú vil hann hava íleggjarar at seta pengar í ymiskt virksemi í teimum palestinsku sjálvstýrisøkjunum. Palestinska stjórnin og einstaklingar skipa í næsta mánaði fyri einari ráðstevnu um møguleikarnar at gera íløgur á Vestara Áarbakka og í Gazageiranum, og tá verða ymisk arbeiði fyri eina milliard dollarar boðin út.

Tony Blair segði í gjár, at palestinski búskapurin er illa fyri, og at fremmandar íløgur kunnu bøta um støðuna. Hann viðgekk, at tann spenta støðan millum palestinar og Ísrael kann darva íløguhuginum, men segði, at tað eru økir, har tað ber til at gera íløgur. Palestinska stjórnin hevur sagt, at búskapurin í teimum palestinsku økjunum kann veksa heili 10 prosent tey næstu trý árini, um fremmandur íløgukapitalur kemur hagar.



### Útflyta ikki korn og rís

Teir hækkandi matvøruprísirnir fáa altsamt fleiri lond til at taka stig fyri at verja seg ímóti avleiðingunum. Eitt nú hava myndugleikarnir í Kasakhstan gjørt av at banna landsins fyritøkum at selja hveiti av landinum, og í Indonesia hevur stjórnin sett bóndrunum forboð fyri at selja rís av landinum.

Eygleiðarar vænta, at fleiri lond fara at taka sama stig sum Kasakhstan og Indonesia at banna korn- og rísútflutningi. Frammanundan hava Kina, India, Vietnam, Kambodja og Egyptaland tikið sama stigið.